LM-068/2022

Fylgiskjal 13

UTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARAÐIÐ

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn
uvmr@uvmr.fo

Dagfesting: **6. september 2021**
Tygara ref.:
Máltal.: **21/15775-2**

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd og uppskot til broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur viðgjørt uppskotini um nýggja náttúruverndarlóg og broytingar í galdandi náttúrufriðingarlóg, sum Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur sent til hoyringar. Hoyringssvarið niðanfyri er gjørt í samráði við Tjóðsavnið, sum er fakmyndugleiki innan náttúru og mentanararv.

Viðmerkingar til bygnaðin og skipan av náttúrufyrisiting
Í uppskotunum til løgtingslóg um náttúruvernd og broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing verður skotið upp, at verandi friðingarnevndir og Yvirfriðingarnevndin halda fram at fyrisita partar av verandi náttúrufriðingarlóg, meðan ein nýggj fyrisiting verður skipað undir landsstýrismanninum at fyrisita náttúruvernd sambært nýggjari lóg um náttúruvernd.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið um náttúruvernd verður sagt, at heimildirnar hjá landsstýrismanninum eftir lógini ætlandi verða lagdar til Umhvørvisstovuna, sum er náttúrufakmyndugleikin undir landsstýrismanninum at umsita, og at landsstýrismaðurin ella annar fyrisitingarligur myndugleiki er kærumyndugleiki, sbr. bls. 15. Í viðmerkingunum, á bls. 28, verður víst á, at neyðugt verður at uppbyggja náttúrufakligar førleikar á Umhvørvisstovuni at fyrisita nýggju náttúruverndarlógina. Mett verður, at Umhvørvisstovan fer at hava tørv á í minsta lagi trimum nýggjum akademiskum størvum. Mett verður, at tørvur verður á 2.100.000 kr. í øktari játtan til hetta endamálið. Harumframt verður mett, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið fer at hava tørv á einum fulltrúa afturat, ið fer at kosta 700.000 kr. um árið.

Sambært galdandi náttúrufriðingarlóg er Yvirfriðingarnevndin evsti myndugleiki. Nevndin er mannað við sorinskrivaranum, ið er formaður, leiðaranum á nátúrsavninum, landsfornfrøðinginum og tveimum umboðum, ið landsstýrið velur. Tjóðsavnið hevur sostatt ein týðandi leiklut í galdandi náttúrufriðingarlóggávu, við tað at leiðarin á nátúrsavninum og landsfornfrøðingurin bæði eru í starvi á Tjóðsavninum og umboða sostatt tann fakliga førleika, ið, sum nevnt omanfyri, er ætlanin at uppbyggja á Umhvørvisstovuni. Virkisøkini hjá Tjóðsavninum fevna um innsavning, varðveiting, gransking og miðlan av náttúru og mentanararvi. Tá leiðarin á nátúrsavninum og landsfornfrøðingurin eru limir í Yvirfriðingarnevndini, er tað júst av teirri orsøk, at stovnurin er fakligur myndugleiki innan varðveiting av føroyskari náttúru og mentanararvi.

Sambært uppskotunum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum skal skipanin við lokalum friðingarnevndum og Yvirfriðingnevnd í verandi náttúrufriðingarlóg halda fram, men náttúrufriðingarlógin skal nú bert hava ásetingar um loyvisgeving í sambandi við at byggja hús, búðir, skúr og annað líknandi uttangarðs og undir bakkanum og nærri enn 300 metrar frá viðarlundum og vøtnum innangarðs, sbr. strikingina av kapitli 2 í uppskotinum til broyting í

Imaliavegur 5 • Postrúm 3370 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • uvmr@uvmr.fo • www.uvmr.fo

friðingarlógini. Í staðin verða ásetingar um náttúrufriðing skipaðar í uppskotinum um nýggja løgtingslóg um náttúruvernd, har nýggja umsitingin undir landsstýrismanninum eftir ætlan skal taka sær av at friða øki og at loyva brúki av náttúruni annars. Nýggja umsitingin skal eisini umsita tjóðgarðar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ikki, at tað er skynsamt, at náttúrufyrisitingin verður býtt í tvær skipanir, og at náttúrufriðing og náttúruvernd verða skipað í tveimum ymsum løgtingslógum. Á hendan hátt verður faklig og fyrisitingarlig vitan spjatt út á enn fleiri stovnar, heldur enn at verða savnað hjá einum og sama myndugleika. Í roynd og veru er náttúruverndarlógin, sum nú er í uppskoti, ein lóg um brúk av náttúruni. Hinvegin hevur broytingin í náttúrufriðingarlógini við sær, at friðingar verða tiknar úr lógini, uttan at samsvarandi vernd verður sett inn í nýggju náttúruverndarlógina. Samanumtikið merkir hetta, at føroyska náttúran verður verri vard enn eftir verandi lóggávu. Harumframt heldur Uttanríkis- og mentamálaráðið, at tað kann skaða álitið á skipanina, at náttúrufriðingin verður flutt frá einari annars royndari og sakkønari nevnd, sum er dómstólslíknandi - og sum liggur uttanfyri fyrisitingina - til ein politiskan myndugleikan, sum longu fyrisitur ferðavinnu, landbúnað, orku- og umhvørvismál umframt Umhvørvisstovuna, sum umsitur orku- og umhvørvismál.

Tjóðsavnið virkar longu nú sum náttúrufakligur myndugleiki á fleiri økjum. Umframt umboðanina í Yvirfriðingarnevndini umsitur Tjóðsavnið meginpartin av fuglaveiðulógini og antikvarisku serskipanina fyri Koltur, sum ætlanir eru um at skipa sum tjóðgarð, og harvið - sbrt. lóggaruppskotunum - verður lagt til Umhvørvisstovuna at umsita.

Tjóðsavnið hevur í starvi fakfólk innan fakøkini plantur, djór á landi, djór í havinum, fornminni, bygningar og siðaarv. Tjóðsavnið hevur sum virkisøki at savna, skráseta, varðveita, granska í og miðla náttúru og mentanararv. Tjóðsavnið hevur sostatt vitanar- og virkisgrundarlag, sum er alneyðugt fyri at kunna fyrisita eina náttúruverndarlóg. Tá frágreiðingar og árinskanningar skulu gerast, er tað í stóran mun Tjóðsavnið, sum stendur fyri arbeiðinum.

Upprunaliga var ætlanin, at Náttúrugripasavnið skuldi gerast partur av eini náttúrufyrisiting á Umhvørvisstovuni. Tann ætlanin bar ikki á mál, og Náttúrugripasavnið er nú partur av Tjóðsavninum. Fakligu umhvørvini í Føroyum eru smá, og tað talar fyri at miðsavna vitanina á einum stovni heldur enn at spjaða hana út á fleiri stovnar og uppbyggja nakað, ið longu er. Uppbygging av vitan og traditiónum í teimum ymsu fakøkjunum tekur tíð, og hildið verður ikki, at tað er skynsamt at uppbyggja funktiónir á Umhvørvisstovuni, sum longu eru til staðar á Tjóðsavninum.

Tað er eisini problematiskt, at Umhvørvisstovan umsitur umhvørvis- og orkumál, sum kunnu vera í mótstríði við atlitini at náttúruverndini.

Verður talan um, at landsstýrismaðurin er kærumyndugleiki, kann landsstýrismaðurin, sum longu umsitur ferðavinnu, landbúnað, umhvørvis- og orkumál lættliga koma í ta støðu, at skula taka avgerð í kærumálum, har sami stovnur og sami landsstýrismaður varða av bæði ákærda og kærara. Hildið verður eisini, at tað eru mótstríðandi áhugamál, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur eftirlit við standinum, sum náttúran er í.

Viðmerkingar til lógaruppskotini

Løgtingslógaruppskotini, sum eru til hoyringar nú, eru broyttar útgávur av teimum lógaruppskotum, ið vóru til hoyringar í 2018, men sum fullu burtur, áðrenn tey vórðu løgd fyri Løgtingið.

Í upprunaliga uppskotinum um løgtingslóg um náttúruvernd frá 2018, sum tá hevði heitið uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni, hevði kapittul 2 almennar ásetingar um burðardygt brúk, og harundir fyrisitingarmið fyri náttúrusløg, vistskipanir og sløg.
Í upprunaligu viðmerkingunum til lógaruppskotið varð ført fram, at ásetingarnar í kapitli 2 um fyrisitingarmið og vitanargrundarlag vóru týðandi amboð til at fáa til vega vitan um føroysku náttúruna. Tað er fatan ráðsins, at fyrisitingarmiðini og vitanargrundarlagið eru berandi súlur í lógaruppskotinum, tí tey eru grundarlagið fyri tulkingum og metingum sambært lógartekstinum. Tað er eisini fatan ráðsins at tey eru avgerandi fyri, at lógin verjir føroysku náttúruna í nóg stóran mun.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur , at vandi kann vera fyri, at náttúran ikki verður nóg væl vard, tá ið valið kann koma at standa ímillum vernd av náttúru í mun til vinnumøguleikar innan eitt nú orku- og landbúnað. Skotið verður tí upp, at t.d. Tjóðsavnið, náttúruverndarfelagsskapir og friðingarnevndir fáa ein lógartryggjaðan ummælis- og kærurætt, áðrenn avgerðir verða tiknar, og kunnu krevja steðgandi virknað, um ummælis- og kærurætturin ikki verður virdur av myndugleikanum við avgerðarrættinum. Hetta tí at avgerðir uttan nøktandi fyrilit fyri náttúruna kunnu hava við sær óbótaligan skaða á føroysku náttúruna. Síðani kundi hugsast, at avgerðir eiga at kunna skjótast inn fyri eina óhefta kærunevnd í náttúrufriðingarmálum, sum við lóg verður løgd undir undir Føroya Kærustovn heldur enn til landsstýrismannin. Líknandi skipan er at finna í donsku *naturbeskyttelsesloven*.

Í ásetingunum um fyrisiting av sløgum í kapitli 2 í lógaruppskotinum, er dentur nú lagdur á veiðu, heysting og gagnnýtslu heldur enn á náttúruvernd. Í ST-sáttmálum og ES-samtyktum um náttúruvernd, eitt nú samtyktini um búøki (Habitatdirektivið), eru kanningar og skrásetingar av vitan um náttúruna grundleggjandi krøv. Føroysk náttúrufyrisiting eigur sjálvsagt at liva upp til altjóða samtyktir um náttúruvernd og serstakliga til teir sáttmálar, ið vit hava bundið okkum til.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ikki, at náttúruverndin fær nóg góðar karmar at virka undir í lógaruppskotinum, sum tað nú fyriliggur, bæði tí at kapittul 2 í upprunaliga lógaruppskotinum er tikin úr lógaruppskotinum, men eisini tí, at lógaruppskotið er orðað eftir norskari lóggávu, har fyrisitingin er væl meiri umfatandi í vavi og øðrvísi skipað enn í Føroyum.

Í kapitli 4 um økisvernd eru ásetingar um landslagsverndarøki. Í Yvirfriðingarnevndini tryggjar landsfornfrøðingurin, at nøktandi vitanargrundarlag og samband er millum varðveiting av náttúru, mentanarlandslagi og fornminnum. Við at flyta økisvernd í nýggja lóggávu, har ein nýggj umsiting skal byggjast upp á Umhvørvisstovuni, hvørvur hetta sambandið.

Samanumtikið metir Uttanríkis- og mentmálaráðið ikki, at hesi uppskotini styrkja náttúruverndina í Føroyum. Hóast verandi náttúruverndarlóggáva hevur síni lýti, so metir ráðið, at veruligur vandi er fyri at náttúruverndin, við fyriliggjandi uppskotum, kann vikna munandi.

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Torkil V. Rasmussen
deildarstjóri